# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Rannvá í Snarskivuni

LISTAFRAMSÝNING



**Hósdagin 14. apríl kl. 16 letur listakvinnan Rannvá Mortensen upp framsýning í forhøllini í Snarskivuni á Vaglinum**

Í gamla posthúsinum í miðbýnum húsast umframt postavgreiðslu eisini Snarskivan, sum gevur havnarfólki greið boð um Havnina. Rúmsátta, ljósa og hugnaliga forhøllin verður eisini brúkt sum fram-sýningarhøli, har mong listafólk hava havt framsýning, síðani Snarskivan læt upp fyri fimm árum síðani.

Endamálið við hesum framsýningarhøli hjá mentamáladeildini er at sameina kommunala tænastu og listaskála, har listin hittir borgaran á alfaravegi, og nú verður forhøllin so karmur um eina áhugaverda listaframsýning hjá Rannvá Mortensen.

Rannvá hevur áður sýnt fram í Galerie Focus og Smiðjuni í Lítluvík. Harumframt hevur hon í nógv ár verið við á Ólavsøkuframsýningini og Várframsýningini. Annars hevur hon havt, saman við øðrum listafólkum, framsýningar uttanlands, m.a. í Svøríki, Danmark og Spania. Í summar skal Rannvá sýna fram í Íslandi.

Til hesa framsýning í Snarskivuni hevur Rannvá arbeitt við akryl-, akvarell- og brotamyndum.

Øll eru vælkomin at síggja listaframsýningina í vanligu upplatingartíðini hjá Snarskivuni, mánadag til fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sofía Gaard**
Oyndarfjørður

andaðist á eldrasambýlinum Vesturskin á Toftum sunnudagin 10. apríl, 88 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Oyndarfjarðar kirkju hósdagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Jóhanna, Alexandra, Kári, Kristjan og Margit**

Tey, ið vilja minnast Fíu, kunnu lata Missiónshúsinum í Oyndarfirði eina peningagávu.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Esther Jacobsen**
Hvalvík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til prestar, kirkjutænarar, sangarar, gravarar, berarar og til tykkum, sum hjálptu á ymsan hátt.
Tøkk fyri kransar, blómur, gávur til Kirkju- og Missiónshúsið og tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Eisini ein tøkk til deild 7.

**Jákup, Eyðbjørg, Magnina og Poulina**

**Dagurin**

**14. apríl. Summarmáli.** Eftir gamlari føroyskari tíðarrokning byrjar summarhálvárið hendan dag. Sagt var, at á summarmála avdagast ikki, tí var klárt í veðrinum, skuldi dagsglæman ikki hvørva. Soleiðis sum summarmáladagur er, soleiðis verður várið. Dagurin eitur annras *Tiburtius*. Saman við bróður sínum varð hann tikin av døgum umleið 225.

Fyri 30 árum síðan:

# Sjónleikurin »Skipið« fyri fullum húsum í 1975



*Frá eini venjing til sjónleikin "Skipið" hjá Steinbjørn B. Jacobsen. Sitandi við borðið, Oskar Hermansen (v.m.), og Óli Kurt Hansen, meðan Eyðun Johannesen stendur í miðjuni og instruerar*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1975*



*Steinbjørn B. Jacobsen*

Í apríl 1975 gekk sjónleikurin »Skipið", sum Steinbjørn B. Jacobsen hevði skrivað, fyri fullum húsum í fleiri vikur.

Steinbjørn B. Jacobsen fekk 1. virðisløn fyri hendan sjónleikin í eini kapping, sum Varðin hevði boðið út til .

Sosialurin
Sosialurin i